

*Hendan myndin varð tikin eina lítla løtu, áðrenn Erik fór í hoppiborgina, har hann var so óheppin at bróta bæði beinini*

hesum førinum, er tíðin heima ikki at meta sum sjúkraviðgerð, tí drongurin ikki skuldi taka nakran heilivág. Tá er tíðin heima heldur at meta sum kravd hvíldartíð, ið skal til fyri at beinbrot kann grøða.

At enda sigur Kærunevndin í hesum skrivinum, at tey... »vilja enn einaferð gera vart við, at hetta ikki merkir, at drongurin skal vera einsamallur heima, men bert, at tann sum er um hann heima, ikki hevur rætt til dagpening...«

Hetta eru Katy og Reidar sera ónøgd við.

– Har mótsiga tey sær sjálvum, so tað rungar eftir í. Tí í tí fyrra svarinum, sum vit fingu frá teimum, søgdu tey, at tað var ikki mett, at standa skaði av, at ein 8 ára gamal drongur var einsamallur í heiminum í 5 – 6 tímar, meðan Katy var til arbeiðis, sigur Reidar, og tað sást týðuliga á honum, hvussu illa honum líkar hesa støðuna, sum tey øll eru komin í.

## Geva ikki upp

Foreldrini bæði undirstrika, at tey gera hetta ikki orsakað av pengunum.

– Vit gera hetta so sanniliga ikki fyri pengarnar. Nei, teir kunnu vit saktans vera fyri uttan. Vit eru so ill um viðferðina, sum vit hava fingið í hesum málinum, og vit ætla okkum at halda fram, inntil vit fáa viðhald, ella ongin annar vegur er eftir. Tí vit halda, at tað er ov galið, at tað skal standast so nógv stríð av einum so, eftir okkara tykki, einføldum máli. Tað er nógv fyri, at eitt so lítið orð, sum »má«, skal føra so nógv stríð við sær, halda tey bæði.

– Vit halda so avgjørt sjálvi, at tað hevði havt umfatandi skaða við sær sálarliga fyri drongin, um hann skuldi ligið einsamallur og hjálparsleysur heima í so nógvar tímar um dagarnar, meðan Katy var til arbeiðis, sigur Reidar og spyr eisini samstundis, hvat barnaverndin hevði sagt, um nú onkur granni hjá teimum klagaði tey fyri at lata drongin liggja einsamallan.

– Hvat heldur tú barnaverndin hevði gjørt, um tey komu á gátt og høvdu funnið Erik liggjandi einsamallan í heimi okkara í sínum egna landi og afførningi, tí hann ikki kundi fara á WC sjálvur, spyrja tey bæði við ein munn.

Reidar og Katy hava eisini fingið ein sosialráðgeva at meta um sálarligu heilsustøðuna hjá Eriki, um hann skuldi ligið einsamallur. Og tann metingin gevur foreldrunum viðhald í, at tað vildi verið alt annað enn sunt fyri drongin.

– Og ta frágreiðingina hava myndugleikarnir eisini fingið, sigur Reidar.

Reidar og Katy ætla sær ikki at geva upp. Tey hava tosað við løgtingsins umboðsmann, og er næsta stigið hjá teimum at kæra málið til hansara.

## Erik sjúkur

Átta mánaðar eftir, at Erik bleiv viðgjørdur fyri staffylikokkar, bleiv hann álvarsliga sjúkur. Foreldrini fóru í miklum skundi á Landssjúkrahúsið við honum, tí hann hevði 41,9 gradir í fepuri. Á Landssjúkrahúsinum bleiv staðfest, at hann hevði fingið menegitis. Hann kom undir læknahond og skjótt bleiv borið at, og hann kom seg skjótt. Men túrurin til Havnar var sera óhugnaligur fyri Reidar og Katy.

– Eg var so bangin fyri, at hann fór at doyggja á veg suður, tí hann hevði so nógvan fepur. Men tíbetur spældi alt so væl av, sigur Katy sinnisrørd á málinum og leggur aftur at, at teirra sonur hevur verið úti fyri nógvum tað seinasta árið.

– Vit royndu at fregnast og spurdu læknarnar, um menegitis kundi verið komið av tí, at Erik fekk viðgerð fyri staffylikokkar, men tað fingu vit so ongantíð nakað svar uppá. Men vit hava altíð fingið at vita, at menegitis kemur ikki av ongum, so tað kundi verið áhugavert, at funnið útav. Tí so hevði tað sanniliga verið talan um lívsvanda av beinbroti, sigur Reidar.

Alt hetta hevur sjálvsagt sett síni merki í familjuna.

– Erik er ikki heilt blivin til tann Erik, hann var, áðrenn beinbrotið enn. Og vit merkja tað eisini væl á dóttrini, at hon er blivin sett til síðis, orsakað av beinbrotunum og sjúkuni hjá Eriki. Men nú royna vit at byggja okkum familjuna upp aftur, soleiðis at lívið kann fáa ta náttúrligu gongdina aftur, sum tað hevði fyri einum ári síðani, tá vit fóru á okkara dreymaferð, siga Reidar og Katy Klein at enda.

## Málið lýkur ikki treytirnar í dagpeningalógini

**Guðrið Joensen, stjóri á Føroya Kærustovni sigur, at kærunevndin kom ta niðurstøðu, at málið um familjuna Klein á Kambsdali ikki lýkur treytirnar í dagpeningalógini**

DAGPENGAR/-FORSORG
*Solby A. Eliasen*

– Eg kann ikki úttala meg um eitt konkret mál. Men tað er so, at tá ein persónur ikki verður mettur at lúka treytirnar í dagpengingalógini, so kann viðkomandi ikki fáa dagpengar, meðan viðkomandi er heima. Men harvið er ikki sagt, at tann persónur, ið velur at vera heima hjá sjúkum barni onki skal fáa. Tí vísa vit til forsorgarhjálpina, tá fólk ikki lúka treytirnar í dagpengingalógini, sigur Gurið Joensen í stuttari viðmerking til málið um familjuna Klein á Kambsdali.

Tað koma umleið 120 kærur í almannamálum inn um árið, og Guðrið sigur, at nú er tann nýggja dagpeningalógin so nýggj, men at tey hava onkrar kærur av líknandi slagi liggjandi.

Føroya Kærustovnur tekur í móti kærum, sum koma inn og innstilla tey so kærurnar til kærunevndina, sum tekur avgerð.

Nevndin í Kærustovninum er mannað við trimum fakfólkum. Einum løgfrøðingi, einum sosialráðgeva og einum lækna.



# KÍ staðfesti støðu sína sum oddalið

*Munurin á fremsta og næstfremsta liðnum í kvinnudeildini var ov stórur til, at talan nakrantíð varð um ein rættiligan oddadyst í Klaksvík sunnudagin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*



**Stóri leikarin var Rannvá Andreasen, ið skeyt trý mál sunnudagin**

1. DEILD KVINNUR
*Páll Holm Johannesen*

Sunnudagin varð farið undir endaspælið í bestu kvinnudeildini. KÍ fekk í fyrsta umfarinum vitjan av B36, og havnarkvinnur vórðu sendar suðuraftur við einum 4-1 tapi.

Talan var um dyst millum tvey tey ovastu liðini í kvinnudeildini, og ikki kann sigast annað enn, at klaksvíkskvinnur staðfestu støðu sína, sum besta boðið uppá ein FM-vinnara í kvinnudeildini.

## Bæði liðini skerd

Bæði KÍ og B36 mangladu spælarar til oddadystin sunnudagin. Harðast raktar vóru B36, ið vóru fyriuttan, Mariu Vang, Susonnu Hansen, Selmu Erol, og Marjun Herup.

Umframt hesar, so er Sólva Joensen farin til Dan-mark-ar aftur, og tá breiddin ikki er so stór sum hjá Kí-kvinnunum, so rakar missurin av fleiri týðandi spælarum meint B36-liðið.

Hjá KÍ sótu Bára Skaale, Jensa Sirdal, Kristina Eyðbjørnsdóttir uttanfyri, men hetta sást ikki aftur á vøllinum sunnudagin, har tað bara vóru aðrir spælarar, ið bitu frá sær.

## KÍ nógv betri

Úr Klaksvík verður sagt, at KÍ-kvinnurnar vóru nógv betri enn B36, og sigurin var fult uppiborin.

Serliga høvdu klaksvíkskvinnur gott tak á miðvøllinum, og við vandamiklum spælarum sum Rannvu Andreasen og Malenu Josephsen, var vandi á ferð hjá B36 stóran part av dystinum.

Longu hálvur tími spældur av dystinum, stóð 3-0 til heimaliðið.

Fyrsta málið kom eftir góðir 15 minuttir vóru farnir. Rannvá Andreasen royndi seg við skoti langt útifrá, og bólturin fór undir B36-málverjan og í málið.

Næsta málið átti Rannvá eisini, eftir hornaspark var Kí-framherjinh fyrst á bóltinum, og kundi økja til 2-0.

Málið til 3-0 skeyt Malena Josephsen. Ann Olsen brýtur ígjøgnum høgru síðu, og við góðari sending, finnur hon Malenu, sum ótarnað kundi leggja KÍ frammum 3-0.

Anja Weihe minkaði stutt eftir um munin við einum langskoti. 3-1 var eisini hálvleiksstøðan í Klaksvík.

## B36 betur við í seinna hálvleiki

Havnarkvinnur komu betur við í seinna hálvleiki, men framvegis var tað heimaliðið sum hevði leikliga yvirvág. Serliga vóru hornasparkstøðurnar hjá KÍ sera vandamiklar.

Eittans mál kom í seinna hálvleiki, og tað fekk KÍ. Aftur var tað Rannvá Andreasen, ið hevði síðsta fót á. Hesaferð kom innlegg úr vinstru frá Vivian Bjartalíð, og Rannvá var skjótari á bóltinum enn B36-málverjin, og kundi lættliga skjóta sítt triðja mál í dystinum,

Heimaliðið kundi skotið fleiri mál, men antin vóru tær óneyvar við royndunum, ella stóð B36-málverjin teimum í vegin.

Samanumtikið kann sigast, at næsta besta liðið í kvinnudeildini kundi ikki gera teir stóru skreytirnar ímóti besta kvinnuliðnum í landinum, og tað ber boð um, at KÍ-kvinnurnar avgjørt mugu vera besta boð uppá ein FM-vinnara, og harvið eisini greipuvinnara.

**Kí-B36 4-1 (3-1)**
1-0 Rannvá Andreasen
2-0 Rannvá Andreasen
3-0 Malena Josephsen
3-1 Anja Weihe
4-1 Rannvá Andreasen


## Roknskapur fyri tíðarskeiðið 1. januar 2002 - 30. juni 2002

| RAKSTRARROKNSKAPUR | 1/1-30/6-2002 | 1/1-30/6-2001 |
|---|---|---|
| | tkr. | tkr. |
| Rentuinntøkur v.m. | 119 | 242 |
| Ómaksgjøld og provisiónsinntøkur v.m. | 5.021 | 4.010 |
| Útreiðslur til ómaksgjøld og provisiónir v.m. | -206 | -422 |
| Virðisjavnan av virðisbrøvum og gjaldoyra v.m. | 60 | 6 |
| Aðrar vanligar inntøkur | 259 | 161 |
| **Úrslit av fíggjarpostum** | **5.253** | **3.997** |
| Útreiðslur til starvsfólk v.m. og umsiting | -3.702 | -3.007 |
| Avskrivingar av ítøkiligum ognum | -179 | -113 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur | -830 | -395 |
| **Úrslit av vanligum rakstri** | **542** | **481** |
| Óvanligar útreiðslur | 0 | -43 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **542** | **438** |
| Skattur | -29 | 0 |
| **Úrslit** | **513** | **438** |

| FÍGGJARSTØÐA | 30/6/2002 | 30/6-2001 |
|---|---|---|
| **Ogn** | | |
| Áogn hjá kredittstovnum v.m. | 8.276 | 8.024 |
| Lánsbrøv v.m. | 500 | 3.002 |
| Partabrøv v.m. | 2.478 | 118 |
| Ítøkiligar ognir | 380 | 747 |
| Tíðaravmarkingar | 992 | 437 |
| **Ogn tilsamans** | **12.626** | **12.328** |
| **Skuld, eginpeningur og avsetingar** | | |
| Onnur skuld | 496 | 100 |
| Tíðaravmarkingar | 258 | 1.444 |
| **Eginpeningur** | | |
| Partapeningur | 10.000 | 10.000 |
| Yvirkursgrunnur | 1.914 | 1.914 |
| Flutt úrslit tilsamans | -42 | -1.130 |
| **Eginpeningur tilsamans** | **11.872** | **10.784** |
| **Skuld, eginpeningur og avsetingar** | **12.626** | **12.328** |
| **Tøl, ið ikki eru tikin við í fíggjarstøðuna** | | |
| Ábyrgdir | 2.044 | 0 |

Skrásetingar nr. P/F 2997

KAUPTHING
Føroyar
Virðisbrævameklarafelag
Tinghúsvegur 14 • FO-110 Tórshavn
tel. 35 1500 • fax 35 1501
www.kaupthing.fo